

*Javnstøða Skulu politisku flokkarnir hugsa um javnstøðu, hvørja ferð teir velja eina nevnd, sleppa menninir í Tjóðveldinum og Javnaðarflokkinum aldrin framat, staðfestir Annita á Fríðriksmørk*

# Tjóðveldi skiftur ikki Heina O. Heinesen út

**JAVNSTØÐA Hóast harðar atfinningar um manglandi javnstøðu, heldur Tjóðveldið fast um, at Heini O. Heinesen skal umboða flokkin í politiska fylgibólkinum, sum skal vera við í arbeiðnum at endurskoða valskipanina**

Áki Bertholdsen

Hóast Tjóðveldi hevur tríggjar kvinnur á Føroya Løgtingi, heldur flokkurin fast um, at tað verður Heini O. Heinesen, sum skal umboða flokkin í politiska fylgibólkinum, sum skal vera við í arbeiðnum at endurskoða valskipanina.

Tað sigur ein av kvinnuligu umboðum hjá Tjóðveldinum á tingi, Annita á Fríðriksmørk.

Í sambandi við valskipanina, hevur nettupp spurningurin um javnstøðu havt ein avgerðandi leiklut og atfinningarnar vóru hvassar um, at bara ein kvinna var ímillum teir fimm serfrøðingarnir, sum vórðu valdir í nevndina at endurskoða valskipanina.

Men síðani hevur tann eini nevndarlimurin borið seg undan valinum og alt bendir á, at ein kvinna verður vald ístaðin og so kravið um javnstøðu gingið á møti.

Men politisku flokkarnir hava eisini hvør sítt umboð í einum politiskum fylgibólki og har eru bara menn valdir.

Løgtingsformaðurin hevur boðað frá, at skuldi onkur flokkur havt hug at endurskoða valið, fer hann ikki at leggja seg í vegin fyri tí.

Men tað er í øllum førum greitt, at Tjóðveldi ger onga broyting.

- Tá ið vit valdu umboð í hendan fylgibólkin valdu vit framsøgufólkið á økinum, altso framsøgufólkið í valdømismálum, sigur Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna.

## Útfrá einum javnstøðusjónarmiði kann tað heldur ikki vera rætt

Hon var sjálv ein av teimum, sum átalaðu manglandi javnstøðuna, men hon sigur, at tjóðveldi hevur tað aðalreglu, at bólkar verða mannaðir við framsøgufólkunum á viðkomandi øki.

- Skuldu politisku fylgibólkar á Løgtingi havt javnstøðu hvørja ferð, merkir tað, at mannligu umboðini í Javnaðarflokkinum og í Tjóðveldisflokkinum ongantíð sleppa framat.

Hetta er tí at hetta eru teir einastu flokkarnir¬, sum hava kvinnuliga umboðan á tingi og sum sostatt kunnu velja kvinnur.

- Út frá einum javnstøðusjónarmiði kann tað heldur ikki vera rætt, heldur hon.

Hon staðfestir, at skulu vit hugsa um javnstøðu, er tað tí avgerandi, at vilja flokkar virka fyri javnstøðu, er tað avgerandi, at teir gera sítt heimaarbeiði longu tá ið valstríðið byrjar.

### Ávíst fyrivarni

Annars heldur hon, at politiski fylgibólkurin skal takast við einum ávísum fyrivarni, tí ósemjan um valskipanina er so stór.

- Vanliga umboðar eitt framsøgufólk allan flokkin, men tað er ikki galdandi í hesum føri, tí ósemjan um valdømini er so stór.

- Skuldu flokkarnir gardera seg, skuldu teir sostatt valt hvør síni tvey umboð í fylgibólkin, eitt sum er fyri einum valdømi og eitt, sum er fyri fleiri valdømum.

aki@sosialurin.fo

## Finnur Fríði kannar makrel

**Eins og íslendingar, er Finnur Fríði eisini í holt við at gera makrel- og sildakanningar í føroyskum sjógvi í samstarvi við Havstovuna**

Rógvi Nybo

Hettar er annað árið, at Finnur Fríði ger kanningar fyri Havstovuna. Tað eru trý á síðani, Finnur Fríði keypti ekkolodds útgerð umborð, fyri at kunna nýtast til gransking av makrel, sild og svartkjafti.

Tað eru settir 14 dagar av, til kanningarnar, og Finnur Fríði er næstan liðugur við kanningarnar.

Teinurin sum silgt verður, er umleið 2200 fjóringar, í høvuðsheitum vestanfyri, norðanfyri og í ein landnyrðing úr Føroyum.

Fyri umleið hvørjar 60 fjóringar skal eitt tov gerðast, umframt CDT og plankton royndir.

Á teininum eru 31 fastar støðir, har tovað verður í ein tíma. Tá trolið er komið inn, verður ein CDT mátari koyrdur niður á 500 metur, til tess at máta hita og salt. Síðan verður ein serligur glúpur koyrdur niður á 200 metur, fyri at kanna plankton.

Umframt hesar 31 støðir, verður trolið eisini koyrt út á øðrum støðum, um man heldur at okkurt áhugavert er at sýggja.

Við á túrinum eru tríggir mans frá Havstovuni, umframt manningina á Finni Fríða, sum telur 12 mans.

Væntandi verður Finnur Fríði aftur í Føroyum í dag.